# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 2. juli hava hjúnini Betty og Páll Mikkelsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at gleða gullbrúðarparið, eru vælkomin í heimið í Dr. Dahlsgøta 8 frá kl. 10.00 til kl. 15.00.

**75 ár**

Fanny Reinert Djurhuus, Innan Glyvur, fyllir 75 ár 4. juli. Vælkomst verður í bygdasalinum í ítróttarhøllini á Skála frá kl 19.00

**70 ár**

Fríggjadagin 1. juli fyllir Hannis Jacobsen, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin heima, Hamarsgøta 1, leygardagin 2. juli frá kl. 10.00-15.00.

**60 ár**

Leygardagin 2. juli verður Óli A. Jacobsen, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Hoyvík, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá starvsmannafelagnum, J. H. Schrødersgøta 9. Tey, ið vilja heilsa upp á Óla, eru vælkomin frá kl 19.00. 9

**Prógv**

Magnus E. Brahé Jørgensen, Hoyvík hevur lokið prógv sum cand. theol. við Københavns Universitet.

Meinhard Poulsen, Saltangará, hevur 17. juni lokið prógv sum cand. scient. í lívfrøði við Universitetið í Keypmannahavn.

**Prógv**

**Yrkisútbúgving innan fiskavirking:**
Maud Túgvustein, Fuglafjørður

**Yrkisútbúgving innan aling:**
Eliseus Ó. Johannesen, Fuglafjørður

# Prógv á Fiskivinnuskúlanum

**Hósdagin í farnu viku fingu hesir næmingar handa prógv síni á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.**



***Prógv fyri hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF):***
*Fremst vinstrumegin: Jákup Ósá, Klaksvík; Ragnhild Olsen, Vestmanna; Hjalti Thomsen, Vágur; Símun S. Petersen, Tórshavn; Finnur Johannesen, Vestmanna; Høgni Christiansen, Vestmanna; Thordar Garðshamar, Hvalba; Poul Arni Jacobsen, Syðrugøta;*
*Aftast vinstrumegin: Janus Skýlindal, Kollafjørður; Birgir P. Marteinsson, Vágur; Anja Petersen, Klaksvík; Celesta Hentze, Saltangará; Elspa Suffía Joensen, Miðvágur.*



***Prógv fyri støðisárið (SIF):***
*Fremst vinstrumegin: Joan Berg Johansen, Tórshavn; Tórunn Jónálvsdóttir, Vestmanna; Elin Bærentsen, Vestmanna; Anna Annelisa Justinussen, Toftir; Johnny L. Rasmussen, Strendur; Kristina Andreasen, Toftir; Joan Berthelsen, Innan Glyvur; Jón Jacobsen, Klaksvík; Annfríða Helgadóttir, Válur, og Finngerð Jensen, Kvívík.*
*Aftast vinstrumegin: Maibritt Festirstein, Klaksvík; Elin Heinesen, Tórshavn; Mary Tórhalsdóttir, Vestmanna; Gunrið Christiansen, Vestmanna*
*Á myndini vanta: Maria Petersen, Vestmanna, og Vanja R. Bjarnadóttir, Miðvágur*

# Heimsins elsta farin um tey 115



*Tá Hendrikje fylti 115 ár mikudagin 29. juni fekk hon vitjan av Laurentien prinsessu úr Hollandi*

**Hendrikje takkar dagligu nøgd síni av sild fyri at hon í dag er heimsins elsta fólk.**

Fyrrverandi handarbeiðslærarin, Hendrikja van Andel-Schipper úr Hollandi varð borin í heim 29. juni í 1890.

Hon býr nú á Westerkim ellisheiminum í Hoogeveen, og hóast høga aldurin er hon ein íðin fótbóltsfjeppari.

- Hon etur eitt stykki av sild hvønn einasta dag, tí tað er so gott fyri heilsuna, sigur leiðarin á ellisheiminum.

- Hon hevur framvegis nógva lívsmegi, leggur hann aftrat.

Ein talsmaður fyri Guinnes-metbókina sigur, at Hendrikje er eldri enn elsti maðurin í heiminum, og tað ger hana til heimins elsta núlivandi fólk.

Heimsins elsti maður annars er Emiliano Mercado Del Toro úr Puerto Rico. Hann varð borin í heim 21. august í 1891.

Sambært Guinnes varð heimsins elsti persónur samfull 122 ár – Jeanne-Louise Calment, sum doyði í 1997.

**Dagurin 2. juli.**
Syftunsøka. Hildin til minnis um enska biskupin í Winchester Swinthun, sum doyði ár 862. 15. juli ár 971 varð hann skírdur halgimenni. Dómkirkjan í Stavanger í Norra er vígd honum. Minningardagur hansara er í Onglandi 15. juli, men í Føroyum og Norra er hann tann 2. juli, sum var deyðadagur hansara. Tað er tí helst úr Norra, at syft-unsøkudagur er komin higar.

2. juli er eisini ein gomul mariumessa, vitjunardagur Mariu, til minnis um at Maria Moy vitjaði skyldkonu sína Elisabeth, móðir Doyparans.

Niels Winther var føddur hendan dagin í 1822.

**Dagurin 3. juli.**
Kornelius. Mong eru halgimenni, sum bera navnið Kornelius, men teir vita ikki við vissu, hvør hesin er. Summir halda, at talan er um pávan Kornelius, sum varð tikin av døgum ár 253. Aðrir siga, at sipað verður til høvuðsmannin Kornelius, sum var fyrsti heidningur, ið var doyptur. Ápostlasøgan kap. 10.

Navnið er latínskt ið kemur av orðinum cornu, ið merkir horn.

**Dagurin 4. juli.**
Ulrikus, deyður í 973. Hann var biskupur í Augsburg í 50 ár, og fyri mongu góðu gerðir sínar varð hann skírdur halgimenni í 993. Hann var annars fyrsta vesturevropeiska halgimenni, sum pávin skírdi.

Týskt navn. Ul kemur av uodal, ið er sama orð sum okkara óðal, rikus merkir eyður.